# Kloakkin í lagi um tveir mánaðir

**Sandur:** Stýrið fyri Sandoyar Meginskúla hevur nú bílagt lutir til kloakkina við Megnskúlan. Um einar tveir mánaðir skuldi alt verið komið uppá pláss, skrivar Sandoyarportalurin. Alt lívrunnið frá Meginskúlanum rennur í Sandsvatn og hevur gjørt tað síðani 1971. Á Meginskúlanum er eisini tannlæknastova. Men nú sær út til at tingini koma uppá pláss.



# Aðalfundur í kvøld

**Sandur:** Sands Arbeiðarafelag heldur aðalfund sín hóskvøldið 18.mars kl. 19 í Virkinum á Sandi, skrivar Sandoyarportalurin Umframt frágreiðing frá nevndarformanninum, Marius Clementsen (myndin) verður eisini nevndarval o.a. á skránni. Limir felagsins hava rætt at bera fram uppskot til fundin og skulu vera nevndini í hendi 8 dagar áðrenn sjálvan aðalfundin.



upp við hesa eftirmeting.

Unn Poulsen sigur, at tær ábendingar, sum hon hevur fingið um, hvussu føroysku fyritøkurnar meta virðið av luttøkuni á stevnuni, er ógvuliga positivt.

– Vit í uttanríkisráðnum eru eisini sera spent upp á ta eftirmeting, sum liggur fyri framman, leggur hon aftrat.

## Stór stevna

Tað er amerikanski sjómatarídnaðurin, sum skipar fyri Boston Seafood Show. Hetta er ein stór stevna, har týðandi veitarar og keyparar av sjómati luttaka.

Hvørt ár luttaka eini 16.000 handilsfólk úr fleiri enn 90 londum, og útbjóðararnir eru fleiri enn 80 í tali.

Í uttanríkisráðnum halda tey, at amerikanski marknaðurin er sera áhugaverdur hjá føroyskum fyritøkum.

Sagt verður haðani, at í 2009 fekk føroyska alivinnan í miðal 2 krónur meira fyri kilo av stóra alilaksinum, sum tær útfluttu til USA, enn tær fingu fyri sama fisk í Evropa. Haraftrat kemur, at amerikanski marknaður er størri enn allur tann evropiski marknaðurin tilsamans.

Tí metir uttanríkisráðið eisini, at stórir møguleikar liggja í hesum marknaði.

Tað hevur soleiðis rættiliga sett ferð á føroyskan laksaútflutning til USA, at chilenska alivinnan seinastu árini hevur verið rakt av kreppu, og at laksaútflutningurin haðani er minkaður við umleið tveimum triðingum.

Eitt, sum er serliga áhugavert fyri føroyskan laksaútflutning til USA er, at amerikumenn hava heft seg við, at føroyskur laksur er sera vælsmakkandi, eins og hann eisini er heilsugóður við stórum innihaldi av omega3-feittsýrum.

Aftanfyri dygdina á føroyskum laksi, liggur fóðurið, sum Havsbrún í Fuglafirði framleiðir. Fóðurið verður burturav virkað úr fiski sum rávøru, og tað er hetta sum ger, at smakkurin í laksinum er so góður, eins og innihaldið av omega3-feittsýrum er so stórt.

Tað eru ikki minst amerikanskar sushi-matstovur, sum hava stóran áhuga í føroyskum laksi.





*Fuglfirðingurin, Samson í Lambanum, er ein av útróðrarmonnunum, sum plagar at avreiða í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Snellubátar fáa ikki tað heilt stóra

**Várróðurin hevur ikki verið nakað at reypað av. Líkindini hava verið skiftandi. Tá roynandi hevur verið, hava bátar gjørt hampiliga góðar dagar, meðan aðrir hava fingið minni. Tað siga tey á Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík**

ÚTRÓÐUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Várróðurin hevur ikki verið so góður hjá klaksvíksbátum.

Úr Klaksvík verður sagt, at líkindini hjá bátunum at royna hava verið hampilig seinastu dagarnar, men fiskiskapurin hevur ikki verið hin heilt stóri.

Besti báturin í Klaksvík í mánadagin hevði góð 1900 pund, og tað er ein av bestu døgum við snellu higartil í vártíðini.

Á Landingarmiðstøð Føroya siga tey, at bátar hava ligið heilt niður í nøkur fá hundrað pund upp á dagin, men hjá summum bátum og ávísar dagar hevur veiðan eydnast betri.

– Várróðurin hevur ikki verið nakað at reypað av. Líkindini hava verið skiftandi, men tá so roynandi hevur verið, hava nakrir bátar gjørt hampiliga góðar dagar, meðan aðrir hava fingið minni.

Úr Klaksvík verður sagt, at flestu bátar, sum royna eftir várfiski við snellu á Norðhavinum, liggja um eitt kar upp á dagin, og eitt kar tekur eini 600 pund.

Snellubátarnir, sum royna eftir várfiski á Norðhavinum og sum Landingarmiðstøð Føroya í Klaksvík avgreiðir, eru einir 20 í tali, tá teir eru flestir.

# Ågot hevði góðan túr

**Veiðan hjá trimum línuskipum, sum landaðu í Klaksvík í mánadagin, lá millum 100.000 og 130.000 pund, sum er góð línuveiða undir Føroyum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin landaðu trý línuskip í Klaksvík. Tey hava øll roynt undir Føroyum og hava havt hampiliga góðan fiskiskap.

Kvik hevði 100.000 pund, Klakkur 112.000 og Ågot, sum hevði besta túrin av hesum trimum, hevði góð 130.000 pund.

Mánadagin landaðu eisini partrolararnir Safir og Smaragd í Klaksvík. Teir høvdu umleið 90.000 pund av upsa tilsamans.

Hitt parið, sum eisini landar til Kósina - Nónhamar og Fjalshamar - hevur ligið seinastu vikuna, tí trupulleikar hava verið við leka í sambandi við aksilin.

Sum skilst, verða Nónhamar og Fjalshamar væntandi klárir at loysa aftur fyrsta dagin.



*Mánadagin var nógv landing í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*